

*Frá hátíðarligu løtuni, tá Atlantic Petroleum varð skrásett á OMX Virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn*

# Atlantic Petroleum breiðir sínar veingir

**Stór og søgulig løta, tá føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum gjáramorgun tók enn eitt stig at víðka um sítt virksemi og varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum OMX í Keypmannahavn**

ORÐ OG MYNDIR
*Símun J. Hansen*
*post@grifla.com*

Nógv fólk var samankomið í morgun, tá Atlantic Petroleum varð skrásett á OMX Virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn. Bæði íleggjarar, bankar, avvarðandi o.o. vóru til staðar. Wilhelm Petersen, stjóri helt eina stutta røðu og umboð fyri virðisbrævamarknaðin bjóðaðu Atlantic Petroleum vælkomin á OMX virðisbrævamarknaðin.

Síðan P/F Atlantic Petroleum varð stovnað í 1998 av 18 føroyskum íleggjarum, kann ikki annað enn sigast, at tað hevur gingið væl hjá felagnum.

Atlantic Petroleum er fyrsta føroyska olju- og gassfelag, og íleggjararnir eru ímillum fremstu vinnulívsfólk í Føroyum. Felagið hevur tó fleiri túsund íleggjarnar, sum finnast kring alt Føroya land og somuleiðis í útlandinum.

Felagið er við oljuleitingini á føroyska landgrunninum, í Sameinda Kongaríkinum og í Norðsjónum.

Eftir at umsóknin hjá Atlantic Petroleum, um at vera skrásett á OMX. virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn, varð góðkend, hevur verið bíðað við spenningi til í morgun, tá Atlantic Petroleum varð skrásett á OMX.

Frámerkið hjá Atlantic Petroleum á OMX er FO-ATLA, og klokkan umleið 09.08 í gjáramorgun byrjaði handilin.

Endamálið hjá Atlantic Petroleum við at skráseta seg á OMX er at víðka um íleggjaraskaran og á tann hátt at skapa enn meiri vøkstur í felagnum.

Atlantic Petroleum er eisini skrásett á virðisbrævamarknaðinum á Íslandi.



*Millum gestirnar var eisini føroyski sendiharrin í Danmark, Herálvur Joensen*



*Frá hátíðarligu løtuni, tá Atlantic Petroleum varð skrásett á OMX Virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn*

## Faroe Petroleum sponsor fyri tiltakið "At Fóta Sær í London"

TÍÐINDASKRIV

Menningarstovan hevur hesa vikuna skipað fyri tiltaki í London. Tiltakið er serliga ætlað skapandi partinum av vinnuni. Tiltakið "At Fóta Sær í London" fevnir um bæði ráðstevnu og vitjanir. Hartil verður eisini skipað fyri einum PR-tiltaki, har innboðin fólk úr bretsku vinnuni kunnu uppliva føroyskan tónleik og sniðgeving.

Tiltakið er fyrst og fremst ætlað teimum, sum vilja taka seg fram á útlendskum marknaðum, og kunnu áhugað lesa meira um tiltakið á www.trade.fo/funky

Føroyska oljufelagið, Faroe Petroleum, íð eigur 22 leitiloyvir í Føroyum og Bretlandi, arbeiðir miðvíst fyri at fremja altjóða samstarv millum London og Føroyar. Felagið hevur í hesum sambandi fyrr skipað fyri tveimum tiltøkum innan fíggarheimin og vinnulívið.

Tað fyrra var eitt temakvøld í høllini hjá Føroya Tele, har umboð fyri fíggjarheimin í London greiddu føroyskum áhugaðum frá, hvussu fíggarheimurin í London arbeiðir og hvørjir møguleikar vóru fyri føroyskum og bretskum samstarvi.

Seinna tiltakið var í London har umboð fyri føroyskt og bretskt vinnulív møttust á donsku sendistovuni í London, har føroyska sendistovan eisini heldur til. Á skránni vóru ymsir fyrilestrar, millum annað greiddi Bárður Nielsen, Fíggjarmálaráðharri frá møguleikum um atgera íløgur í Føroyum. Nógv folk á høgum stigið frá vinnulívinum og luttóku.

Sum eitt framhald av hesum arbeiði stuðlar Faroe Petroleum Ráðstevnuni í London í hesi viku "At fóta sær í London" har bretskt vinnulív, føroyskur tónleikur og føroyskur list møtast.

Faroe Petroleum sigur í tíðindaskrivi, at tað sær tað "kreativu vinnuna", sum Føroyar hevur at bjóða, sum sera týðandi, og sum eina vinnu, íð hevur brúk fyri stuðuli.